# Grønland gongur undan

Sum fyrsta land í heiminum fer Grønland at vaksinera bæði dreingir og gentur ímóti HPV-virusi, sum millum annað kann elva til lívmóðurhálskrabba. Tilboðið verður boðið øllum 12 ára gomlum børnum og er ókeypis. Heilsumyndugleikarnir meta, at sum frá líður verður úrslitið, at einar sjey færri kvinnur fara at doyggja av lívmóðurhálskrabba um árið. Átakið er mett at kosta 2,5 mió. krónur, men heilsuverkið væntar at spara líka nógv um árið.

*Grønlendska heilsuverkið væntar sær nógv burtur úr vaksineringini (Mynd: Sermitsiaq)*






*Sverri Justinussen, stjóri fyri Íløgudeildini hjá Eik í Miðlahúsinum: Hav disciplin og lat teg ikki fanga av "grádigheit*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

skjótt eru blivin rík, eru tey somu, sum skjótt gerast fátøk".

Aftan fyri hesi orð goymir seg áminningin um, at tú ongantíð skalt lata teg rúsa av egnari vidgongd (succes) og harvið gera íløgur við tí sannføring, at tú er fullkomin og ikki kanst gera mistøk. Ert tú náddur har til, er vegurin til húsagang vísur.

Tykkum øllum kunnugt, so er virksemið hjá Kaupthing í Føroyum vorðin ein partur av Eik. Hetta merkir millum annað, at virksemið, ið hevur við virðisbrævamarknaðirnar at gera, er samlað í einari sterkari eind við fakfólki, ið dagliga fylgir marknaðunum. Tit eru altíð yvir fyri. Fyrimunirnir við, at hetta partabrævaspælið nettup hevur koyrt seinasta hálvárið, er, at tíðin hevur verið merkt av fjáltri og ótryggleika á marknaðinum. Á henda hátt hava tey, ið hava luttikið í spælinum, mugu ásannað, at tað at gera partabrævaíløgur krevur umhugsni, tað inniber vanda, men so sanniliga eisini møguleikar.

Áðrenn eg fari at gevast, skal eg geva tykkum, ið veruliga eru farin undir at gera partabrævaíløgur, ella umhugsa at gera veruligar partabrævaíløgur, nøkur góð ráð.

### Hugsa teg væl um

- Kunna teg um marknaðin og tey partabrøv, ið verða handlað á marknaðinum
- Syrg fyri eini nøktandi váðaspjaðing
- Ger tínar íløgur eftir førimuni
- Minst til, at partabrævaíløgur í veruleikanum skulu vera langtíðaríløgur
- Hav disciplin og lat teg ikki fanga av "grádigheit"

Nú skal eg sjálvandi ansa eftir ikki at gerast alt ov profetiskur, men nøkur væl vald orð til seinast, kann eg ikki lata vera við:

Eitt orðatak sigur:

"Tú kanst fáa allar tínar syndir fyrigivnar, bara ikki beinleiðis býttisskap" .

Tað, vit kunnu fáa burtur úr hesum orðum, er, at tú sum íleggjari heilt víst fert at gera skeivar íløgur, og tú mást læra teg at fyrigeva tær sjálvum. Hinvegin fer tú at fáa marruna av at hava gjørt mistøk grundað á ófyrigevandi býttisskap.

Lat ongantíð "grádigheit" fáa fastatøkur á tær við tí úrsliti, at tú gert býttisligar íløgur, ella íløgur, har tú ikki hevur mett um, hvat úrslitið verður, um ikki gongur sum væntað.

"Disciplinur" er lyklaorðið hjá tær sum íleggjari. Set ongantíð hús og heim og familjurnar vælferð í veg fyri at tjena pening. Tað er ikki tað vert.

Eitt annað orðatak sigur:

"Tey fólk, ið peningaliga



*Frá íløgukvøldinum í Miðlahúsinum, sum Eik og Sosialurin skipaðu fyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*